## Frem undir strikuna

Tað gongur av skriðuni hjá Frem. Í gjár fekk liðið hjá Atla Danielsen ein sekk uppá 4-1 í Fredericia. Hálvleiksstøðan var 2-0. Frem fekk ikki sítt mál fyrr enn í yvirtíðini, men tað bøtti lítið um støðuna. Køge tapti 3-0 í Silkeborg, hálvleiksstøðan var 0-0, men í 2. hálvleiki gjørdi Silkeborg bart. 2 umfør eru eftir í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Køge og Frem spæla í Køge næstu ferð. Á síðsta leikdegnum tekur Frem ímóti Vejle, og Køge skal spæla í Gladsaxe ímóti AB.

## Amager fingið ferð á

Nú eru tað bert 2 stig sum skilja Roskilde og Fremad Amager. Sunnudagin vann Amager 2-0 á heimavølli ímóti Glostrup. Mohammed Abdalas skoraði beint áðrenn hálvleik, og Thomas Myssing økti við eini sannari perlu eitt korter fyri leiklok. Rókur av Fløtum Jespersen byrjaði millum teir fyrstu 11 hjá Amager, men noyddist av vøllinum eftir bara 24 minuttum. Oddaliðið Roskilde snávaði á útivølli ímóti Greve, Roskilde var á odda 2-0, men síðsta korterið spældi Roskilde 10 ímóti 11, og hesa yvirvág gagnnýtti Greve við at skjóta 2 mál.

# 46% av dønum halda við Svøríki

**Hóast rokmikla EM-undankappingardystin millum Danmark og Svøríki í Parkini ífjør, so halda 46% av dønum við Svøríki. Politikken fer at fylgja tætt við tí svenska landsliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Zlatan og Svøríki verða donsku hetjurnar, tá EM-endaspælið fer av barkastokki um vikuskiftið*
*Mynd: polfoto/AP*

Danska blaðið Politikken hevur gjørt eina lesarakanning millum sínar ítróttarlesarar, um hvønn tey fara at halda við í EM-endaspælinum í fótbólti, sum verður leikt í Eysturríki og Sveis. Og hóast Danmark og Svøríki hava leikt heilar 99 A-landsdystir ímóti hvørjum øðrum síðani byrjanina av 20. øld, og hóast stórt rok var í samband við EM-undankappingardystin ímillum londini bæði í Parken í Keypmannahavn í juni ífjør, so er annarhvør danskur fótbóltsfjeppari ivaleysur: Hann heldur við Svøríki. Svøríki hevur fingið næstan fimm ferðir fleiri atkvøður enn Týskland, sum er tað landið danir halda næstmest við. 10% siga seg halda við Týsklandi. Spania er nummar trý við 7%, Italia nummar fýra, og Holland er nummar fimm. Tað rørir ikki danska fótbóltsfjepparan, at talan er um arvafíggindan í bæði fótbólti, og í søguligum høpi. Tá Danmark og Svøríki spældu javnleik 2-2 í bólkaspælinum í EM-endaspælinum, í Portugal í 2004, og harvið sendu Italia út í myrkrið, var partur av italsku pressuni ikki í iva, at talan var um eina norðurlendska samansvørjing. Og danskir fótbóltsfjepparar vísa seg nú, sum góðir norðurlendingar.

### Fara at fylgja Svøríki

Politikken hevur tikið avgerð um, at blaðið skal fylgja svenska landsliðnum sum var tað teirra "egna" landslið, nú tá Danmark er við. Ítróttarblaðmennirnir hjá Politikken fara at fylgja Zlatan, Elmander, Henke, Mellberg, Ljungberg og Mellberg eins tætt og var talan um eina danska EM-luttøku. Christian Lindhardt, tíðindaleiðari hjá Politikken sigur:

- Vit fara at lova lesarunum, at vit fara at fylgja tætt við tí svenska landsliðnum undir EM-endaspælinum, bæði áðrenn, undir og aftaná dystirnar. Vit fara at fylgja tí svenska landsliðnum, sum var tað okkara egna. Tann drúgvi journalistiski dekningurin fer at verða stuðlaður við nógvum undirhaldandi tilfari, fakta og myndum. Ígjøgnum okkara reportara, Tommy Grøn, sum fer at fylgja tí svenska landsliðnum undir EM-endaspælinum fara vit at arbeiða fyri møguleikanum, at lesarnir hjá Politikken kunnu stilla beinleiðis spurningar til teir svensku spælarnir, og fólkini aftan fyri liðið.

Lesarnir hjá Politikken halda minst við Grikkalandi, bara 0,7% halda við Grikkalandi. Og skal ein meta eftir spælistílinum, so fer Grikkaland heldur ikki at vinna nógv hjørtu hesaferð.

# Amerikanskur styrkur til KÍ

**Joe Zewe, sum áður hevur roynt seg hjá Viborg, skal styrkja um KÍ-álopið í seinnu kappingarhálvu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Heimasíðan hjá KÍ skrivar, at 24 ára gamli Joe Zewe kemur til Klaksvíkar sunnudagin. Sterki amerikanski álopsspælarin hevur í tvey ár spælt í donskum fótbólti, men seinasta árið hevur hann spælt í USA. Í Danmark spældi Joe Zewe fyrst fyri 2. deildarliðið B1909, har hann skoraði nógv mál. Hetta hevði við sær, at Viborg keypti Zewe, sum hevur spælt fyri Viborg í bæði superliguni og Royal League. Í fjør gekk sáttmálin hjá Zewe við Viborg út, og síðani hevur hann spælt í USA.

Dreymurin hevur allatíðina verið at sloppið aftur til Europa at spæla, og nú fær hann møguleikan í KÍ. Partarnir hava gjørt eina avtalu um, at Joe Zewe skal spæla fyri KÍ restina av hesum kappingarárinum, men partarnir hava samstundis avtalað eina royndartíð fram til summarsteðgin.

Joe Zewe er uppvaksin í einum forstaði til Pittsburg í Pennsylvania, og hann hevur millum annað spælt fótbólt fyri Penn State. Zewe er 184 sentimetrar høgur og verður roknaður sum ein sterkur og íðin álopsspælari. Hann hevur eisini royndir sum kantspælari.



*So skjótt sum flytingarvindeygað letur upp, verður spæliloyvið hjá Joe Zewe flutt til KÍ*